# Ógvusligur samanbrestur fyri framman

**Eitt samt landsstýrið hevur boðað almennu fakfeløgunum frá, at útreiðslurnar til almennar lønir hækka ikki eitt oyra næsta ár. Verður nøkur lønarhækking eftir samráðingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum næstu vikurnar, kann tað viðføra uppsagnir hjá tí almenna. Fakfeløgini eru sera misnøgd við útspælið frá landsstýrinum, og tey ætla at taka kampin upp. Tí stendur ein ógvusligur samanbrestur á almenna arbeiðsmarknaðinum fyri framman**



*Partarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum stevna beint ímóti hvørjum øðrum, og tað kann roknast við einum ógvuligum samanbresti næstu vikurnar*

SÁTTMÁLAR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Bárður Nielsen:*
*– Vit vildu gjarna givið øllum eina lønarhækking, men vit mugu síggja veruleikan í eyguni. Tað eru ikki pengar til fleiri lønarútreiðslur hjá tí almenna, og skulu fakfeløgini hava eina lønarhækking, so merkir tað færri starvsfólk hjá tí almenna, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaðurin*



*Jóannes Eidesgaard:*
*– Vit blanda okkum ikki upp í sjálvar sáttmálasamráðingarnar, tí tær skulu verða fríar, men vit hava gjørt ein politiska semju um, at útreiðslurnar til almennar lønir skulu ikki vaksa næsta ár, og so vóna vit, at fakfeløgini vilja halda aftur, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*



*Jarvin Hansen:*
*– Vit taka kampin upp. Vit fara als ikki at góðtaka at samráðast við einum lønarkarmi, sum frammanundan er ásettur til null, og okkara útspæl til einar samráðingar verða ongantíð, at vit fara eftir ongum, sigur Jarvin Hansen, formaður í Pedagogfelagnum*



*Magnus Tausen:*
*– Vit samráðast ikki, tá ið karmurin er null frammanundan. Landsstýrið skal ikki sleppa við hesum ígjøgnum samráðingar. Skulu teir hava eina null-loysn, so mugu teir lóggeva fyri tí, sigur Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag*

Heystið verður rúkandi heitt á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Eitt samt landsstýrið gjørdi týsdagin fakfel-øgunum púra greitt, at útreiðslurnar til almennar lønir vaksa ikki eitt oyra næsta ár. Fakfeløgini vilja als ikki góðtaka eina null-loysn, og tey ætla at taka kampin upp.

– Vit samráðast ikki, tá ið karmurin er null frammanundan. Landsstýrið skal ikki sleppa við hesum ígjøgnum samráðingar. Skulu teir hava eina null-loysn, so mugu teir lóggeva fyri tí, sigur Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður, bakkar ikki ein tumma, og hann ger greitt, at avgerðin hjá landsstýrinum stendur rimmarføst.

– Vit vildu gjarna givið øllum eina lønarhækking, men vit mugu síggja veruleikan í eyguni. Tað eru ikki pengar til fleiri lønarútreiðslur hjá tí almenna, og skulu fakfeløgini hava eina lønarhækking, so merkir tað færri starvsfólk hjá tí almenna, sigur landsstýrismaðurin.

### Útlitini eru ikki tespilig

1. oktober fara nógvir av sáttmálunum á almenna arbeiðsmarknaðinum úr gildi, og í hesum døgum byrja innleiðandi fundirnir til sjálvar sáttmálasamráðingarnar millum tað almenna og fakfeløgini.

Vøllurin er væl og virðiliga kálkaður, eftir at Bárður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, var á fundi við fakfeløgini seinnapartin týsdagin. Har gjørdi hann fakfeløgunum púra greitt, at lønarútreiðslurnar hjá tí almenna vaksa ikki næsta ár.

– Hetta er tað sama, sum eg havi sagt alt ár og eisini í fjør. Vit sita í hesum døgum og stríðast við eitt hall á fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár upp á 430 milliónir krónur, og tað skulu vit hava niður. Útlitini eru ikki tespilig, og tí er búskaparstøðan í landinum heilt einfalt ikki til fleiri lønarútreiðslur hjá tí almenna, sigur Bárður Nielsen.

– Vit mugu øll taka eitt tak fyri at venda búskaparligu støðuni í landinum, og eg rokni ikki við, at fakfeløgini fara at krevja lønarhækking fyri síðani at fáa uppsagnir hjá tí almenna. Inntøkurnar hjá tí almenna hava staðið í stað í fleiri ár, og kanska minka tær eitt vet næsta ár. Tí kunnu útreiðslurnar ikki halda fram at vaksa, sigur landsstýrismaðurin.

### Uppsangir kunnu gerast úrslitið

Landsstýrið stendur sum ein maður um avgerðina um, at lønarútreiðslurnar hjá tí almenna skulu ikki vaksa í 2006. Hetta váttar løgmaður eisini.

– Vit blanda okkum ikki upp í sjálvar sáttmálasamráðingarnar, tí tær skulu verða fríar, men vit hava gjørt ein politiska semju um, at útreiðslurnar til almennar lønar skulu ikki vaksa næsta ár, og so vóna vit, at fakfeløgini vilja halda aftur, líka sum tey fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum gjørdu fyrr í ár, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men hvat um fakfeløgini fáa eina lønarhækking í samráðingunum. Verða tað so uppsagnir hjá tí almenna?

– Vit hava fríar samráðingar, og nú mugu vit síggja, hvat úrslitið verður. Men tað er greitt, at halda vit fast um, at lønarkarmurin skal ikki hækka, so verða tað pláss fyri færri fólkum, um lønin hækkar.

### Fakfeløgini taka kampin upp

Fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum eru sera misnøgd við útspælið frá landsstýrinum, men tey hava als ikki í hyggju at geva seg frammanundan.

– Vit taka kampin upp. Vit fara als ikki at góðtaka at samráðast við einum lønarkarmi, sum frammanundan er ásettur til null, og okkara útspæl til einar samráðingar verða ongantíð, at vit fara eftir ongum, sigur Jarvin Hansen, formaður í Pedagogfelagnum.

Formaðurin í Lærarafelagnum er enn meira avgjørdur um útspælið frá landsstýrinum.

– Eg kundi skilt tað, um landsstýrið kom og segði, at hesaferð eru ikki pengar til tað stóra, men at teir koma sum eitt samt landsstýri og siga við fakfeløgini, at lønarkarmurin er null, er ótrúliga óheppið. Tað er forkastiligt, at lønarkarmurin skal avgerast, áðrenn samráðingarnar byrja, sigur Magnus Tausen.

– Hetta skapar ein sera keðiligan stemning millum partarnar, men vit fara ikki at góðtaka útspælið. Ein null-loysn merkir í roynd og veru ein reallønarlækking, og tað góðtaka vit als ikki, sigur hann.